

*Fólk kunnu leiga Vanir fyri umleið 1500 kr. um tíman. Og tá er rúm fyri 30 ferðafólkum, umframt manning, siga teir tríggir eigararnir, sum nú fara undir veruligt virksemi. F.v. Jóan Pauli í Dali, Jón í Dali og Regin Joensen*

# Leigatúrar kring alt landið

Vanir navnið á lekra stuttleikabátinum hjá teimum trimum Jóan Paula og Jón í Dali og Regin Joensen. Umframt at sigla av Bursatanga við ferðafólki hvønn mánamorgun, skipa teir eisini fyri leigutúrum kring alt landið.

Tað eru longu tvey ár síðani, at teir keyptu bátin úr Portugal, og síðani hava teir arbeitt við at fáa øll loyvi til vega, til tess at sigla við ferðafólki.

- Nú alt tað praktiska er komið undir land, er tað bara hugflogið hjá fólki, ið setur mørkini, sigur Jón í Dali, sum vísir á, at fólk kunnu leiga bátin til túrar kring alt landið, fyri bert 1500 kr. um tíman. Og tá er rúm fyri 30 ferðafólkum umframt manning.

- Vit hava longu gjørt fleiri leigutúrar við fyritøkum og feløgum, sum ynskja at hugna um starvsfólk ella viðskiftafólk. Millum annað hava vit havt leigutúrar til festivalarnar, har ferðaløg hava leigað bátin allan dagin, sigur Jón í Dali.

Vanir Tours siga, at tað eisini ber til at fáa mat og drekka við í prísinum, ella fólk sjálvi taka tað við og matgera umborð.

Báturin er óvanliga rúmligur og lekkur, bæði innan og uttan. Í neðra eru tvey kømur við vesi og brúsu, umframt gallu og kabúss við kókiplátum, stórum køliskápi og mikroovni. Harumframt er ein rúmlig salong og uppihaldsrúm.

Eisini eru tveir skjóttgangandi gummibátar, so til ber at kava ella at sigla inn í grottir.

- Stórur eftirspurningur hevur verið á fiskitúrum. Tí hava vit eisini góða útgerð umborð, millum annað fimm toskatráður og eina hemaratráðu, siga teir í Vanir Tours.























hvonn
BRASSERIE
Tel 35 00 35 · hvonn@hvonn.fo · www.hvonn.fo